# ítróttur

Nr. 60 • hósdagur • 31. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# KÍ í kløunum tráði í steypakappingini

**Klaksvíkingar nýttu tríggjar ólógligar spælarar í steypadystinum móti Fram, men kappingarnevndin tykist ivasom um, hvussu teir skulu takla hesa søkina, og teir hava útsett avgerðina til seinni í vikuni**


SPÆLARASKRÁSETING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Klaksvíkingar hava síðani 2. páskadag, tá ið teir í fyrsta umfarinum í landskappingini vunnu ímóti HB, verið í góðum fótbóltshýri. Men nú hava teir fingið eitt skot fyri bógvin, og tað skotið hava teir fyrst og fremst sjálvir skuldina av.

Á fundi týsdagin viðgjørdi kappingarnevndin hjá FSF støðuna, sum er íkomin, eftir at tað er vorðið greitt, at KÍ í steypadystinum í Gundadali 20. mars ímóti Fram nýtti tríggjar spælarar, sum ikki høvdu pappírini at spæla fyri KÍ í lagi. Talan er um Heðin á Lakjuni, Høgna Madsen og Hjalgrím Elttør. KÍ hevur fyri langari tíð síðani gjørt sáttmála við teir allar



*Hjalgrím Elttør var ein av spælarunum hjá KÍ, sum ikki hevði pappírini í lagi í dystinum móti Fram í steypakappingini*

tríggjar fyri hetta kappingarárið. Men KÍ hevur ikki, soleiðis sum tað áliggur teimum at gera í sovornum førum, syrgt fyri, at spæliloyvini eru komin til Klaksvíkar, og tað er álvarsamt.

KÍ vann 7-1 ímóti Fram, men nú er møguleiki fyri, at sigurin fer at gleppa teimum av hondum, og at tað í staðin fyri KÍ verður Fram, sum í fjórðingsfinaluni skal eiga heimavøll ímóti B68.

### Formaðurin ivast

Bjarki Mohr er formaður í kappingarnevndini hjá FSF. Hann váttar, at nevndin hevur viðgjørt málið á fundi. Men nevndin hevur ikki enn tikið avgerð í málinum.

- Talan er um trupult mál, tí KÍ hevur ikki roynt at snýta nakran. Tað snýr seg snøgt sagt um eitt stórt menniskjaligt mistak, har felagið hevur gloymt at senda loyvisbrøvini til góðkenningar hjá FSF. Øll vita, at teir tríggir ólógligu spælararnir eru fluttir til KÍ í vetur, og gomlu feløgini hava leysgivið teir, sigur Bjarki Mohr.

Formaðurin í kappingarnevndini sigur seg ikki duga at síggja, at tað tænir nøkrum ítróttarligum endamáli, at KÍ verður dømt at tapa dystin, og hann sigur eisini, at lógirnar hesum viðvíkjandi kunnu tulkast soleiðis, at tað veldst um orsøkina til, at ólógligir spælarar verða nýttir.

- Vit hava eisini dømir frá fyrr av, at feløg hava mist FM, tí at eftirnavnið á einum spælara hevur verið skrivað skeivt á dómaraseðli. Eg haldi, at tað er fullkomiliga burturvið, at lógirnar skulu tulkast so fýrakantað. Eg havi frætt, at UEFA onkuntíð í líknandi málum við ólógligum spælarum hevur dømt bót til felagið heldur enn at revsa ítróttarliga. Tað ætli eg mær at kanna, tí so kann tað nýtast sum præcedens ella fyridømi, sigur formaðurin í kappingarnevndini.

einni í hesi vikuni verður væntandi endalig avgerð tikin í málinum. Formaðurin í kappingarnevndini sigur, at nevndin fer at ráðføra seg við løgfrøðing, áðrenn endalig avgerð verður tikin.

- Tað er ein møguleiki, at KÍ verður dømt at tapa dystin og harvið verður tveitt úr steypakappingini, men eg haldi sjálvur, at tað hevði verið rættast heldur at revsað umsitingarliga, tí KÍ hevur ikki roynt at snýtt nakran. Men tað er altavgerandi, hvussu løgfrøðisligi ráðgevin hjá okkum tulkar lógirnar, sigur Bjarki Mohr.

Sosialurin royndi eisini at fáa fatur á leiðsluni í KÍ, men hetta eydnaðist okkum tíverri ikki, men vónandi eydnast tað okkum at fáa viðmerkingar frá teimum til blaðið í morgin.

# B36 úr steypakappingini?

**Tá ið KÍ 2. páskadag vann 4-3 á HB í Formuladeildini, vóru øll spæliloyvi komin upp á pláss, men hjá onkum øðrum felag tykist okkurt ivamál verða.**


SPÆLILOYVIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Sosialurin hevði mikudagin samband við umsitingina hjá FSF fyri at kanna, um spæliloyvini hjá KÍ vóru komin upp á pláss til dystin í Formuladeildini móti HB 2. páskadag. Tá var alt komið í rættlag, var váttað av skrivstovuni hjá FSF.

### Ivamál hjá B36

Síðani spurdu vit okkum fyri um aðrar leikarar hjá øðrum feløgum í fremstu deildini, ið hava skift felag í vetur. Tað vísti seg, at í allarflestu førum var spæliloyvið komið upp á pláss.

Eitt undantak var tó. Tað var B36-leikarin Eyðun Højgaard, sum ikki var skrásettur í leikarayvirlitinum hjá FSF. Eyðun Højgaard hevur verið búsitandi í Danmark og hevur leikt við ÍF Føroyum, men er nú komin heim aftur á klettarnar. Hann var við í dystinum hjá B36 móti NSÍ í Formuladeildini mánadagin, og hann var eisini við, tá ið B36 vann 4-2 á Skála í steypakappingini herfyri. Um so er, at spæliloyvið hjá honum ikki er komið upp á pláss, er eisini vandi fyri, at B36 verður dømt at tapa dystin móti Skála, og tí verður tað kanska Skála, sum fær eitt ókeypis pláss í fjórðingsfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið.

# UEFA er eirindarleyst

**Eitt felag ella landslið, sum nýtir spælara, sum loyvini ikki eru í lagi hjá í dysti, sum europeiska fótbóltssamgongan hevur ábyrgd av, verður uttan mun til orsøkina fyri mistakinum dømt at tapa 3-0, sigur UEFA pressustjórin**


SPÆLILOYVI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Í prátinum við formannin í kappingarnevndini um KÍ spælararnar, sum ikki høvdu spæliloyvi verður víst til UEFA, og at tað skal kannast, hvussu teir viðgera sovorna støðu, sum er íkomin, eftir at KÍ hevur nýtt fleiri spælarar í steypakappingini, sum ikki hava spæliloyvi í lagi.

Pressustjóri hjá UEFA er Frits Ahlstrøm, sum er dani, og sum eisini er kendur í føroyskum fótbólti. Eitt nú nýtti FSF hann til pressutalsmann, tá ið landsdystirnir í Landskrona vórðu spældir í 1991 og í 1992.

Tá ið vit greiða UEFA pressustjóranum frá spurninginum um spæliloyvini, sum hevur tikið seg upp eftir steypadystin millum Fram og KÍ, er eingin ivi, og hann svarar upp á standandi fót:

- Fyrst skal eg undirstrika, at tað bara er upp til FSF at avgera handa spurningin. UEFA blandar seg ikki í spurningar og mál, sum hoyra undir fótbóltssambondini. Men tað eru púra greiðar reglur fyri, hvussu ein sovorðin søk hevði verið avgreidd, um talan hevði verið um sama mál í landsdysti, Europa Cup dysti ella dysti av øðrum slagi, sum UEFA hevði ábyrgdina av.

*Hvør hevði avgerðin verið?*

- At liðið, sum ikki hevði skil í pappírunum, hevði verið dømt at tapa 3-0.

*Men er tað ikki munur á, um talan er um snýt, og tá ið talan er um mistak?*

- Í UEFA høpi er eingin munur. Hjá UEFA ber ikki til at meta um sovorðið. Har er tað knívskorðið. Tað liðið, sum ikki hevyr syrgt fyri at hava skil í hesum tingunum verður dømt at tapa 3-0. Tað vita feløgini, og tað vita fótbóltssamgongurnar. Tað eru dømi um feløg og landslið, sum hava tapt, sjálvt um tey hava vunnið á vøllinum, sigur Frits Ahlstrøm, pressustjóri hjá UEFA.

# Ein katastrofa



**Ein av teimum leikarunum, ið ikki hevði loyvi til at spæla fyri KÍ í dystinum móti Fram, er Heðin á Lakjuni, og hann heldur tað verða eina katastrofu, um liðið verður tveitt úr kappingini**


SPÆLILOYVI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Heðin á Lakjuni skifti í vetur úr HB til KÍ, og hann skrivaði undir við barndómsfelagið longu í november mánað.

- Eg havi ikki havt illgruna um, at spæliloyvið hjá mær ikki var í lagi. Eg helt, at tá ið eg hevði skrivað undir við KÍ, fór felagið at fáa øll loyvi upp á pláss, men so var ikki, sigur hann.

Kviki vongspælarin dylur ikki fyri, at eftir hansara tykki er talan um sløs, ið ikki eigur at koma fyri, og hann heldur tað verða eina katastrofu fyri felagið, um mistakið fer at hava við sær, at KÍ ikki sleppur at halda fram í kappingini um Løgmanssteypið.

- Eg vænti tó ikki, at vit verða tveittir út. Tað rættasta er nokk at geva KÍ eina bót, ella at dysturin hjá okkum móti Fram verður leiktur av nýggjum, og at vit tríggir, ið ikki høvdu spæliloyvi upp á pláss, ikki verða við í tí dystinum, sigur Heðin á Lakjuni.